## 2010 vánaligt ár hjá bankunum

Danski Tjóðbankin væntar, at danskir bankar fara at missa nógvan pening í ár. Bankin hevur mett um støðuna hjá 14 teimum størstu bankunum, og niðurstøðan er, at tapið verður umleið tríggjar ferðir størri í ár enn í 2009. Eftir metingini fara bankarnir at missa 1,5 prosent av teimum samlaðu útlánunum í ár ímóti 0,52 prosentum í fjør. Børsen skrivar, at eftir hesum verður tapið hjá bankunum millum 50 og 70 milliardir krónur í 2010. Torsten Bech, greinari hjá LD Markets, sigur við Børsen, at tað verður avgerandi fyri úrslitið hjá tí einstaka bankanum, hvussu hansara útlán eru sett saman.



## Kent skip 50 ár

Fyrradagin vóru 50 ár, síðani íslendska sjóverjuskipið Óðinn til Íslands á fyrsta sinni. Skipið, sum er bygt í Aalborg, er 61 metrar langt, 10 metrar breitt og merkt góð 900 tons. Óðinn var við í øllum teimum trimum toskakríggjunum millum íslendingar og bretar í farnu øld, og eina ferð fekk skipið skaða, tá eitt bretskt skip sigldi á tað (myndin). Umframt at virka sum sjóverjuskip var Óðinn hjálparskip, og sambært Morgunblaðnum togaði hann næstan 200 skip til lands, tí okkurt var áfatt. Óðinn varð tikin úr sjóverjuni fyri fýra árum síðani.

# Leita í vreiði eftir pápunum

**Nýstovnaða grønlendska felagið "Løgfrøðiliga Faðirleys" vil hava lóggávuna broytta, soleiðis at faðirloysingar kunnu fara aftur í tíðina fyri at finna progv fyri faðirskapi**

FAÐIRLEYSIR GRØNLENDINGAR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í Grønlandi er við at reisa seg eitt fólksligt krav millum tey mongu fólkini, sum ongantíð hava funnið danska (ella føroyska) pápa sín.

Í 50-árunum, 60-árunum og 70-árunum vóru ómetaliga nógvir serliga danskir handverkarar í longdi tíð í Grønlandi og bygdu íbúðarhús, og skip frá alskyns tjóðum løgdu inn í grønlenskar havnir.

Lógin um rættarstøðuna hjá børnum kom ikki í gildi í Vesturgrønlandi fyrr enn í 1963 og í 1974 í Eystur- og Norðurgrønlandi. Tey, sum fødd eru fyri ta tíð, kunnu ikki við nakrari lóg í hondini fara til dómstólarnar fyri við blóðroyndum at fáa staðfest hvør pápi teirra er.

- Faðirleys børn hava í fleiri ættarlið skap po nógva vreiði, og tað merkir framvegis grønlendska samfelgið, sigur sálarfrøðingurin Conni Gregersen við grønlendska útvarpið.

Í Grønlandi er ein vreiði móti danska samfelagnum, og tað hongur saman við mátanum, sum Danmark er farið við Grønlandi. Men tað er esini ein persónlig vreiði, sum botnar í, at fleiri danskir menn fóru frá grønlendsku unnustum og børnum sínum, sigur Conni Gregersen, sum heldur tað vera gott, at faðirleysu vaksnu børnini finna saman, og at evnið verður viðgjørt.

Connie Gregersen heldur, at eisini ungir grønlendingar hava trupulleikar við sínum samleika, tí teir hava blandað upphav.

### Nýggj lóggáva má framskundast

Kuupik Kleist, formaður í grønlendska landstingum er talsmaður fyri at fáa nýggja grønlendska familjulóggávu. Lóggávan er tætlað at verða broytt um tvey ella trý ár, men hetta eigur at verða framskundað, heldur Kuupik Kleist, sum sjálvur er føddur í 1958 – við ongum pápa.

Hann sigur, at tað ávirkar fólk nógv ikkki at vita, hvør pápin er, og tað merkir eisini, at tey ikki hava nakran pápa at arva.

Sum sjey ára gamal hitti hann pápa sín eina ferð men hevur síðan einki samband havt við hann. Hann hevur ikki kent trongd til at fara at leita eftir pápanum, men hann viðgongur, at saknurin eftir einum pápa kemur til hansara viðhvørt.



*Kuupik Kleist, formaður í grønlendska landstinginum skilir væl tey, sum fegin vilja finna pápa sín. Hann er í somu støðu, hevur einki samband við pápa sín*

Nógvar ræðusøgur eru í Grønlandi um, hvussu tað var at vaska upp sum faðirloysingur. Børnini vóru happað, høvdu tey ongan pápa og haraftrat høvdu ljósa húð. Summi siga frá, hvussu illa lærarar fóru við teimum, og familjan skammaðist.

Grønlendska útvarpið hevur havt fleiri sendingar um málið, og nú hevur rithøvundurin Anne Sofie Hardenberg givið út bók við heitinum Kampen for en far.

# Hjálpin fer til barnaheim i Haiti

**Lærararnir í Sankta Frans skúla í Havn eru ernir av næmingum sínum, sum mánadagin savnaðu yvir 13.000 krónur inn til Haiti**

NEYÐHJÁLP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sera væl varð tikið undir við loppusøluni mánadagin í Sankta Frans Skúla á sjálvari pálsmessu. Kl. 8 byrjaðu tey sum vanligt við morgunsangi. Áðrenn børnini fóru í sínar skúlastovur, greiddi stjórin stutt og greitt frá um vanbýtið, børnum er fyri, tá náttúrkreftirnar gera um seg, og kríggj herja.

Hvør næmingur í sínum lagi legði upp til at fáa so gott úrslit sum gjørligt. Ikki varð gjørt sørt burtur úr tí myndaliga, - at sølan skuldi síggja innbjóðandi og meiningsfull út. Skeltini vóru ikki at fara skeiv av.

Bakstur, heimagjørd bomm og slikkipinnar lógu frammi til sølu umframt annað heimagjørt góðgæti. Tónleikafløgur og skemtifløgur vóru viði eisini, sum foreldur høvdu latið børnunum við til neyðhjálpina.

Samanumtikið var tað bæði so og so eitt ordiliga gevandi tiltak. Pengarnir, ið inn komu, fór til Frelsunnarherin í Føroyum, ið skal byggja barnaheimið upp aftur í Port- au Prince, ið teir mistu í jarðskjálvtnum. Sølan gav kr. 13. 226, 50.

Av sínum eintingum fóru tríggjar gentur úr 6. b oman á Kongabrúnna og niðan aftur við eini bússu. Tær komu aftur við meira enn 600 kr. hálvan tíma seinni. Lærararnir hildu teimum ikki til, men Elisabeth, Elisabeth og Aðalbjør vildu hetta sjálvar.

Børnum dámar at taka ábyrgd, tá karmarnir eru í lagi. Soleiðis kendist tað á pálsmessu 2010., siga lærarnir, sum takka mammum, pápum og sera dúgligum næmingunum, ið teir eru ikki sørt ernir av.